# Síðsta lívstekin frá Neptun

**Vit fara her at endurgeva brævið, sum skiparin á Neptun Óla Jákup Kristoffersen sendi til sonin Kristoffur seinasta ferð, teir vóru inni í Reykjavík. Aðrir av manningini kunnu eisini hava sent brøv, men hetta er seinasta lívstekin frá Neptun, sum vit vita um. Brævið var soljóðandi:**



*Brævbjálvin við brævinum úr Íslandi. Á honum stendur Harra Kristoffersen, yngri, Vestmanna, Føroyar. Brævið er stemplað 23.4.34*

***Reykjavík 18. apríl 1934***

Góði sonur mín,
Eg skal takka tær fyri brævið, sum eg líka nú havi fingið frá tær. Tað er gleðiligt, at tit liva øll væl og hava tað gott. Vit liva allir væl her umborð á Neptun. Men vit hava so lítið fiskað. Vit eru sovorðnir skittar at fiska á Neptun í ár, men eg vænti, at tað fer at ganga betur, tá vit koma út aftur. Nú hava vit fingið feska sild til agn. Tað hevur verið frálíka gott veður síðan á páskum, men nú vit hava verið inni, hevur verið illveður. Vit hava verið her í tveir dagar. Eg fekk brævið frá tær líka nú, sum vit eru lidnir (klárir) at sigla, og eg havi ongar pengar eftir. Ella skuldi eg keypt tær okkurt og sent tær ein pakka heim. Men tú skal líta á, at eg skal nokk senda tær ein, tá ið vit koma onkunstaðni inn aftur. Tú skalt heilsa mammu tíni frá pápa og siga, at hann leingist so grúiliga illa eftir at koma heim til tykkum øll. Eg haldi, at vit munnu fara at koma heim um 20. maj ella har um leið, tí tá haldi eg, at vit hava fult skip.

Her er líka sum høgtíðsdagur í dag. Tað er fyrsti sunnudagur, sum íslendingar kalla hann. Tað er so óføra nógv fólk úti á gøtunum, at tað er illa gangandi. Tað vóru 40 menn, sum kapprunnu ígjøgnum gøturnar, og eg var og hugdi at teimum. Og so ganga allir skúladreingirnir og marsjera fleiri hundrað í tali, og eisini fleiri hundrað skótar, bæði dreingir og gentur. Nógvir menn ganga og spæla uppi í havn(ini). So her er nógv at síggja í dag. Men nú skulu vit fara avstað, tí nú er gott veður. Vit fara at royna at fáa okkum nakað av fiski, so vit ikki verða ringastir. Tað verður ikki stuttligt at koma heim og einki hava fiskað, tí øll hini hava fiskað nógv.

Góði Kristoffur, heilsa nú øllum systkjunum frá pápa og góðu kæru mammu tíni eisini. Pápi leingist heim til tykkum øll, men tað gerst ikki við. Neptun má vera full av fiski, áður enn vit sigla heim.

*Vinarlig heilsa*
*frá pápa tínum*

**Óla Jákup**


*Hetta er byrjanin og endin á brævinum, sum er seinasta lívstekn frá Neptun*

# Fyrsta skipið við føroyskum flaggi

**Ein partur av søguni um Óla Jákup og Neptun er eisini um flaggið, sum var eitt tað seinasta Steingrim hevði á orðið í síni frásøgn um, tá ið teir fara avstað. Henda frásøgn er grundað á bókina Merkið hjá Niels Juel Arge**

Millum teir mest eldhugaðu sjálvstýrismenninar var Óla Jákup. Hann var uttan iva fyrsti skipari og reiðari, sum flaggaði við føroyskum flaggi á skipi sínum.

Jákup Follend í Vestmanna hevur greitt frá, tá ið teir á Eysturlandunum í 1923 sóu Neptun liggja undir Langanesi veittrandi við føroyska flagginum. Hesa sjón høvdu teir ikki sæð áður.

Vanligt var, at føroysku skipini flaggaðu fyrsta páskadag, og tað var við ymiskum fløggum, sum danska flagginum, dúvuflaggi ella veðraflaggi.

Men Óla Jákup flaggaði við føroyskum flaggi øll árini, til hann gekk burtur. Men hetta dámdi ikki myndugleikunum.

Jákup Follend var við Neptun í 1924-1926. Hann greiddi frá, at tá teir komu á Havnina í 1924 varð Óla Jákup boðsendur at koma á fútaskrivstovuna. Hann varð ákærdur fyri at hava siglt við føroyskum flaggi og fyri hetta fekk hann 20 krónur í bót.

Fyrstu ferð, skip sást á Havnini við føroyska flagginum á mesanmastrini, var mariumessudag 1926, tá ið Óla Jákup kom siglandi inn á vánna. Eisini hesa ferð varð hann meldaður.

## Bakkaði sjálvt ikki fyri kongi

Kongur var á vitjan í Føroyum í 1926. Ein av hesum døgum kongur var í Havn við einum fylgi av herskipum, kom Neptun inn á Havnina við føroyska flagginum á mesanmastrini. Tað vóru minst trý onnur skip, sum gjørdu tað sama.

Í 1926 kom Óla Jákup úr Leith 13. november og skuldi leggja skipið fyri teym. Hann flaggaði sum vant við føroyska flagginum. Hann legði skipið fyri akker, og manningin fór til hús at fáa sær ein bita.

Meðan hann var staddur heima, kom verjuskipið Beskytteren inn á Vestmanna. Teir settu bát út, og menn fóru í land. Næstkommanderandi fór beint niðan til sýslumannin og kravdi, at flaggið á Neptun varð strikað í stundini. Sýslumaðurin var so illa kroystur, at hann kendi seg noyddan at fara niðan í Skálar. Hann heitti á Óla Jákup um at fara umborð at taka flaggið niður.

Hetta svaraði Óla Jákup ikki til. Hann gav sær góðar stundir at eta døgurða. Hann fór so umborð, tók akkerið upp, setti í gongd, sigldi so tríggjar ferður um Beskytteren og kippaði við flagginum. Síðan fortoyaði hann skipið fyri veturin. Men føroyska flaggið varð ikki tikið niður fyrr enn sólin setti.

Óla Jákup flaggaði tískil bert við føroyskum flaggi við Neptun, eisini undir Íslandi. Hesum fingu myndugleikarnir í Føroyum eisini boð um frá donsku verjuskipunum undir Íslandi.


*Neptun við Merkinum*



*Neptun sigldi runt Beskytteren við Merkinum í húnar hátt. Tekning Thomas M. Smith*